# Ódámlig innkrevjing

**Hvørja ferð ein arbeiðsgevari skal gjalda til nýggju Barsilsskipanina skal hann gjalda hundrað krónur í sokallaðum »avgreiðslugjaldi«. Og verður rokningin ikki goldin innan sjey dagar, fer upphæddin beinleiðis til pantingar. Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, kallar innkrevjingarskipanina ódámliga**

INNKREVJING
*Rúnar Reistrup*



TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA
SUÐUROYAR ØKI Tlf.371051
Postsmoga 69, 800 TVØROYRI

| | |
|---|---|
| Føroya Banki | 6460-115.555.7 |
| Føroya Sparikassi | 9181-124.107.0 |
| Postgiro | 9909-006.658.3 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870-150.072.5 |

[redacted]

Dagf: 17.07.2001
V-tal: [redacted]
Kontonr.: [redacted]

Rokning viðv. barsilsgjaldi.

Við hesum verður send útgreinað rokning vegna Barsilsskipanina. Sambært ll.nr.48 frá 3.apríl 2001 við tilhoyrandi kunngerðum skal arbeiðsgevari rinda 0,25% av útgoldnu A-lønunum til Barsilsskipanina. Gjaldsfreistin fyri hesa rokningina er 7 dagar, og verður ikki goldið til tíðina, verður upphæddin innheintað við panting.
Hjáløgd er fulltrú, sum heimilar Toll- og Skattstovuni at eftirhalda gjaldið, samstundis sum lønirnar verða fluttar.

| Skrásetingardagur | Tekstur | Upphædd |
|---|---|---|
| 01.06.2001 | Krav til barsilsskipan | 1,00 |
| 17.07.2001 | Avgreiðslugjald | 100,00 |

Tilsamans at gjalda í seinasta lagi 24.07.2001 101,00 kr.

Toll- og Skattstova Føroya
Barsilsskipanin

*Umframt ta einu krónuna, sum ein arbeiðsgevari skuldi rinda til nýggju Barsilsskipanina, skuldi arbeiðsgevarin rinda 100 krónur í »avgreiðslugjaldi«. Hóast tað ikki er meira enn ein vika síðan, at rokningin var send frá Toll- og Skattstovuni, var seinasta gjaldsfreist í gjár. Arbeiðsgevarin kann nú, sambært orðaljóðinum í rokningini, vænta sær vitjan frá pantufúta.*

Nógv bendir á at Fíggjarmálastýrið er farið eina tonn ov langt í royndunum at fáa peningin til nýggju Barsilsskipanina kravdan inn so skjótt og lætt sum møguligt.

Í royndini at fáa arbeiðsgevarar at geva Toll- og Skattstovu Føroya fultrú at taka peningin beinleiðis av kontoini, og soleiðis sleppa undan at krevja peningin inn við rokning, hevur Fíggjarmálastýrið í kunngerð ásett, at rokning fyri gjald til Barsilsskipanina skal rindast innan 7 dagar eftir at Toll- og Skattstovan hevur sent rokningina. Harafturat hevur Toll- og Skattstovan álagt arbeiðsgevarunum at gjalda 100 krónur fyri tað, sum kallað verður »avgreiðslugjald«.

## Avgreiðslugjald fyri 1 krónu

Ein arbeiðsgevari, sum hevur sett seg í samband við Sosialin, hevur goldið 400 krónur i løn í farna mánaði. Av hesum skal hann rinda 0,25 prosent til nýggju Barsilsskipanina. Hetta er samanlagt 1 króna í umtalaða føri.

Hesa krónuna hevur arbeiðsgevarin fingið rokning fyri, men rokningin ljóðar uppá 101,00 krónur. Orsøkin er, at omaná ta einu krónuna, sum arbeiðsgevarin skal gjalda til Barsilsskipanina, skal hann gjalda 100 krónur í avgreiðslugjaldi. Í rokningini verður gjørt vart við, at upphæddin skal gjaldast innan sjey dagar – annars verður upphæddin innheintað við panting, stendur í rokningini.

– Hatta er láturligt. Høvdu hasar 100 krónurnar farið í Barsilsskipanina, so hevði eg einki havt ímóti tí. Men eg havi nógv ímóti at 1 króna fer í Barsilsskipanina og 100 krónur fara i landskassan, sigur arbeiðsgevarin, sum skuldi gjalda rokningina í seinasta lagi í gjár.

– Eg skilji ikki at Toll og Skatt hevur loyvi at krevja so nógv í avgreiðslugjaldi, tí upphæddin er nógv hægri enn hægst loyvda rykkjaragjald.

## Sjáldsamur háttur

Barsilsskipanin, sum Vinnumálastýrið hevur evnað til, verður umsitin av ALS og liggur soleiðis undir Vinnumálastýrinum nú hon er komin í gildi. Men sjálv innkrevjingin av peningi til skipanina liggur hjá Toll- og Skattstovuni og harvið undir Fíggjarmálastýrinum.

Vinnumálastýrið hevur tískil einki havt við innkrevjingarskipanina at gera. Og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er alt annað enn glaður fyri innkrevjingarháttin.

– Tað virkar sera órímiligt at geva fólki bara sjey daga gjaldsfreist. Tað er sera stutt. Og at seta eitt avgreiðslugjald á 100 krónur á hvørja rokning, dugi eg ikki at skilja, sigur Bjarni Djurholm. Hann sær hetta sum eitt tekin um at Fíggjarmálastýrið møguliga roynir at trýsta arbeiðsgevararnar at geva Toll- og Skattstovuni fultrú at taka peningin beinleiðis av kontoini hjá arbeiðsgevaranum.

– Hasin innkrevjingarhátturin tykist mær sjáldsamur og hoyrir eftir mínum tykki einum heilt øðrum samfelagsformi til. Tað eigur at vera valið hjá arbeiðsgevaranum um hesin vil gjalda rokningarnar sjálvur ella geva landinum fultrú at taka peningin beinleiðis av kontoini. Og tú eigur ikki at gera treytirnar soleiðis at arbeiðsgevarin í roynd og veru ikki hevur nakað val. Eg haldi at man hevur gjørt skipanina sera ósmidliga og ódámliga mótvegis teimum, sum skulu gjalda inn, og eg skilji ikki at man hevur valt hendan leistin.

## Fíggjarmálaráðharrin skal svara

Bjarni Djurholm ætlar ikki at lata sær lynda, at innkrevjingarskipanin kastar ringt ljós á Barsilsskipanina, og tí fer hann í næstum at biða fíggjarmálaráðharran um eina frágreiðing.

– Eg haldi at tað er spell at man hevur eina innkrevjingarskipan, sum kann vekja óvilja. Tað er eingin orsøk til at gera skipanir so kantutar at fólk illneitast á hana. Sjálv Barsilsskipanin annars loysir upp fyri nógvum møguleikum, og eg havi ta fatan, at arbeiðsgevararnir hava tikið væl ímóti henni. Tað er tískil sera óheppið, at innkrevjingin kann vekja illvilja ímóti skipanini, og tí fari eg í næstum at venda mær til landsstýrismannin í fíggjarmálum og spyrja hví man hevur valt eina so stirvna skipan, sigur Bjarni Djurholm.

Barsilsskipanin kom í gildi 1. juni og fyrstu innkjrevjingarnar vórðu sendar út mitt í hesum mánaðinum.








Landsstýrispensjónir:

# Politikarar taka í egnan barm



*Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø vilja hava málið um landsstýrispensjónir viðgjørt av nýggjum*

**Eftirlønarskipanin fyri landsstýrismenn skal nú avtakast fyribils. Síðani skal óheft nevnd setast at gera nýggja skipan. Hetta hava Helena Dam á Neystabø og Høgni Hoydal tikið stig til, fyri at bjarga trúvirðinum hjá politisku skipanini. Andstøðan stuðlar ætlanini**

LANDSSTÝRISPENSJÓN
*John Johannessen*

Málið um eftirløn til landsstýrismenn hevur fingið eina gongd, ið meint skaðar trúvirðið og álitið á politisku skipanina í Føroyum.

Hetta halda Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, og Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisfloksins, sum tí hava tikið stig til at fáa landsstýrispensjónirnar avtikar í løgtinginum so skjótt eftir ólavsøku, sum gjørligt.

## Nullstilla støðuna

Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø boða í tíðindaskrivi frá, at tey eru samd um, at landsstýrismaðurin í lógarmálum ger uppskot klárt at leggja fyri landsstýrið og tingið, har tær broytingar í eftirlønum landsstýrismanna, sum tingið samtykti í mai, verða settar úr gildi og støðan nullstillað.

Síðani vilja teir báðir floksleiðararnir hava eitt nýtt uppskot fyri løgtingið um at broyta lógirnar um samsýning landsstýrismanna og tingmanna, soleiðis at tað verður ásett, at ein óheft nevnd skal gera tilmæli um lønarviðurskiftini hjá politikarum.

Eftir ætlanini hjá Høgna Hoydal og Helenu Dam á Neystabø, skal óhefta nevndin regluliga gera tilmæli um eftirlønar- og lønarviðurskiftini hjá polikarum, og síðani skal almenningurin væl og virðiliga kunnast um tilmælini, áðrenn politiski myndugleikin sleppur at staðfesta síni egnu lønarviðurskifti við lóg.

## Við í Grundlógina

Tað er nevniliga ásett í stýriskipanarlógini, at lønarviðurskiftini hjá løgtingsog landsstýrismonnum verða ásett við lóg. Tí eru løgtingslimir noyddir til sjálvir at samtykkja síni egnu lønarviðurskifti og tey hjá starvsfeløgunum í landsstýrinum.

Men eisini hetta vilja Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø í longdini hava broytt. Tey eru samd um, at skriv skal sendast grundlógarnevndini, har heitt verður á hana um at gera uppskot í ætlaðu føroysku grundlógina, har óhefta nevndin fær heimild til beinleiðis at áseta lønarviðurskiftini hjá ting- og landsstýrismonnum.

## Andstøðan stuðlar

Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, boðar í tíðindaskrivi frá, at hann fult tekur undir við, at málið um eftirlønirnar hjá landsstýrismonnum verður tikið aftur, og at ein uttanveltað nevnd verður sett til at endurskoða viðurskiftini.

Harumframt boðar Jóannes Eidesgaard frá, at Javnaðarflokkurin ásannar, at málið um eftirlønirnar hjá politikarunum átti at havt bíðað til komið var á mál við einari virðiligari pensjónsskipan fyri tey mongu, sum bert fáa fólkapensjón.

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, segði eisini í viðmerking í Sosialinum í gjár, at eitt uppskot um skilagóðar broytingar fór at fáa fullan stuðul frá honum.

# Eftirlønin var eitt mistak

**Jóannes Eidesgaard ætlar sær fult og heilt at stuðla uppskotinum um, at ein óheft nevnd viðgera landsstýrispensjónirnar. Samstundis ásannar hann, at nýggja eftirlønarskipanin fyri landsstýrismenn helst var eitt mistak**

LANDSSTÝRISPENSJÓN
*John Johannessen*

Javnaðarflokkurin tekur fult undir við, at málið um eftirlønirnar hjá landsstýrismonnum verður tikið aftur, og at ein uttanveltað nevnd verður sett til at endurskoða viðurskiftini.

Hesum boðar formaður Javnaðarfloksis, Jóannes Eidesgaard, frá í tíðindaskrivi.

Eisini sigur Jóannes Eidesgaard, at Javnaðarflokkurin ásannar, at málið um eftirlønirnar hjá politikarunum átti at havt bíðað til komið var á mál við einari virðiligari pensjónsskipan fyri tey mongu, sum bert fáa sína fólkapensjón.

## Mistak

Jóannes Eidesgaard hevur annars verið ein av forsprákarunum fyri nýggju landsstýrispensjónunum. Hann átti saman við Rúnu Sivertsen, Jógvani Djurhuus og Helenu Dam á Neystabø broytingaruppskotið til landsstýrispensjónirnar, sum varð samtykt í løgtinginum.

Men nú ásannar Jóannes Eidesgaard, at landsstýrispensjónirnar helst vóru eitt mistak.

»Ásannandi, at øll í okkara samfelag – eisini politkarar – eiga at hava góð og greið eftirlønarviðurskifti, tók Javnaðarflokkurin lut í hesi viðgerð. Men hin vegin fer einki av hvørki politikarum ella politiskum flokkum at taka í egnan barm, tá eitt mistak er hent. Og mangt bendir á, at so er í hesum máli, og tískil harmast eisini flest allir tingmenn í dag um gongdina í hesum máli og eru sinnaðir at geva málinum eina nýggja viðgerð«, skrivar Jóannes Eidesgaard í tíðindaskrivinum.

## Minnast til pensjónistarnar

Í tíðindaskrivinum nýtir Jóannes Eidesgaard høvið til at minna á, at pensjónsspurningurin hjá teimum mongu, sum bert hava fólkapensjónina at líta á, enn er óloystur, tí sitandi samgonga, sum segði seg vilja loysa málið, enn ikki er komin við nøkrum.

– Tí vil Javnaðarflokkurin staðiliga gera vart við, at viðgerðin av einum nýggjum uppskoti til eftirløn eigur at bíða til breiða fjøldin av Føroya fólki hevur fingið eina virðiliga pensjónsskipan, sigur Jóannes Eidesgaard og heitir á hinar flokkarnar um at loysa málini í røttu raðfylgju.

Í Sosialinum seinasta leygardag segði Jóannes Eidesgaard, at tað er eitt fak at vera politikari, og tí eiga politikarar at fáa góða eftirløn.



*Jóannes Eidesgaard og Javnaðarflokkurin stuðla uppskotinum um, at ein óheft nevnd skal viðgera landsstýrispensjónirnar. Jóannes Eidesgaard ásannar, at pensjónirnar vóru eitt mistak*